# Ferð á frítíðarfisking í Føroyum

**- Fyri einum góðum ári síðani spurdu vit okkum fyri um møguleikan at skipa fyri frítíðarfisking í Føroyum, og vit fegnast um, at hetta í dag er veruleiki, sigur Betty Sennov, annar eigarin av skipinum Arctic Janus, sum í samráð við Ferðaráð Føroya er farin undir royndartúrar í Føroyum við frítíðarfiskarum úr Týsklandi**

FERÐAVINNA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*- Vit vendu okkum til Ferðaráð Føroya fyri skjótt einum ári síðani um loyvi at skipa fyri frítíðarfiskitúrum í Føroyum, og vit eru ógvuliga glað fyri, at ætlanin nú er veruleiki, sigur Betty Sennov, annar eigari av Arctic Janus*

Týsdagin kl. 15 var tíðindafundur umborð á skipinum Arctic Janus, sum í framtíðini skal sigla á føroyskum havleiðum við frítíðarfiskarum.

Tað eru tey bæði Betty Sennov úr Danmark og Wolfgang úr Týsklandi, sum eiga Arctic Janus, og sum síðani oktober 2002 hava arbeitt við verkætlanini við frítíðarfisking undir Føroyum. Tey hava fyrr siglt við frítíðarfiskarum í donskum farvatni.

Fitt av fólki var komið saman niðri á Bursatanga týsdagin, har Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráði Føroya, legði fyri at lýsa gongdina frá oktober í fjør, tá eigarararnir settu seg í samband við Ferðaráð Føroya um ætlanir sínar at koma inn á føroyska marknaðinum við frítíðarfisking.

### Framgongd fyri ferðavinnuna

- Hóast vit hava roynt at marknaðarføra Føroyar sum eitt frítíðarfiskistað burturav, hevur hetta ikki hilnast serliga væl higartil. Tískil er talan í dag um eitt framstig fyri føroysku ferðavinnuna, segði ein vælnøgdur Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráði Føroya.

Víðari vísti hann á, at talan hevur verið um eitt drúgt arbeiði, men at úrslitið í dag ikki kundi verið betri.

- Trygdarviðurskifti, fiskiloyvi, komfortur o.a. er í lagi, og tey krøv, Fiskimálaráðið hevur sett, verða eisini gingin á møti í hesi verkætlan, vísti Heri Niclasen á. Hesar treytir eru m.a. rapportering um knøttstøðu, frágreiðing um túrarnar og at treytirnar um vinnuligan fiskiskap verða hildnar.

Heri Niclasen heldur, at marknaðurin fyri frítíðarfisking er stórur, og at ein ein ávísur partur av marknaðinum longu er fingin í lag.

- Við tað, at marknaðurin er so stórur, meti eg ikki, at Arctic Janus kemur at kappast við føroyskt virksemi av hesum slag, t.d. Norðlýsi. Tvørturímóti setir hetta ferð á nýhugsan í føroysku ferðavinnuni, vísir stjórin á.

Heri leggur afturat, at hugskotið frá útlendsku eigarunum fóru til hoyringar hjá fólki í vinnuni í Føroyum, og breið semja var um, at verkætlanin var mennandi og góð, og at Betty Sennov og Wolfgang skuldu hava grønt ljós at fara undir at hýsa frítíðarfisking í Føroyum.

- Hetta hevur ikki kostað eitt oyra fyri føroyska ferðavinnu, og tey komu við einum lidnum konsepti og einum marknaði frammanundan, vísir Heri vælnøgdur á.



*Á tíðindafundi týsdagin umborð á Arctic Janus helt stjórin á Ferðaráði Føroya, Heri Niclasen, røðu, og vísti hann m.a. á møguleikan at marknaðaføra Føroyar sum eitt frítíðarfiskistað burturav*

### Frítíðarfiskimenn hugtiknir

Fyrsti royndartúrurin hjá frítíðarfiskimonnunum umborð á Arctic Janus var mánadagin, og síðani verður hildið fram til Arctic Janus fer til Danmarkar 6. september.

Í løtuni eru sjey týskir frítíðarfiskarar umborð, og sambært Betty Sennov eru teir sera væl nøgdir við umstøðurnar og túrarnar í Føroyum.

- Nógvir fyrispurningar hava verið ymsastaðni frá um hesar túrar, og áhugin tykist avgjørt vera til staðar at frítíðarfiska undir Føroyum, sigur Betty Sennov. Danski eigarin á Arctic Janus leggur afturat, at tveir oddamenn fyri frítíðarfisking í Týsklandi eru umborð, og at teir lata sera væl at umstøðunum við kalda, fríska sjónum og vøkru náttúruni.

Umframt týskarar hava hálendingar og onglendingar eisini sýnt frítíðarfisking undir Føroyum áhuga, og tískil eru útlitini góð fyri, at Arctic Janus verður ein attraktiv uppliving fyri ferðafólk og harvið eitt framstig á føroyska ferðavinnuøkinum.

Betty Sennov sigur, at túrarnir á hesum sinni bert eru í lokalum farvatni millum oyggjarnar, uttan at farið verður longri túrar út á bankarnar.

### Samskipa við øðrum fyritøkum

Saman við Ferðaráði Føroya og Fiskimálaráðnum eru fleiri onnur ferðavinnufeløg við í verkætlanini. Smyril Line, Atlantsflog, Maersk Air, Green Gale og Flogfelag Føroya fara øll at skipa fyri fiskitilboðum.

- Ætlanin er at kunna bjóða út lidnar frítíðarfiskipakkar til ferðafólk, har gistingarhús og útferðartilboð eisini eru íroknað, so flestu partar í føroysku ferðavinnuni fáa ágóðan, sigur stjórin á Ferðaráði Føroya, Heri Niclasen.

### Stuttleikafisking eisini á landi

Umframt Norðlýsi, smábátar og nú Arctic Janus hevur Ferðaráð Føroya eisini ynski um, at stuttleikafisking á landi verður virkin.

- Herfyri var grein í Sosialinum um eysturríkskan frítíðarfiskimann, sum helt Føroyar vera millum bestu londini í heiminum til stuttleikafisking á landi, og henda møguleikan eiga vit at nýta, vísir Heri á.

Ein av teimum báðum eigarunum á Arctic Janus, Betty Sennov, vísir eisini á henda møguleika.

- Hóast vit við Arctic Janus sjálvsagt fyrst og fremst hugsa um havfiskarí, eru umstøðurnar avgjørt til staðar at bjóða ferðafólk til vøtnini kring Føroyar, og henda møguleikan eiga vit at gera okkum dælt av, sigur Betty Sennov at enda, sum saman við týskaranum Wolfgang fer at sigla við frítíðarfiskarum undir Føroyum komandi dagarnar.

Arctic Janus er bygdur í Skagen í 1974 fyri danska Fyr- og vågevæsenet, og síðani varð hann keyptur og lutvíst umbygdur av eigarunum, Betty Sennov og Wolfgang, sum fara til Danmarkar 6. september. Ætlanin er síðani at koma aftur næsta summar og hýsa stuttleikafiskimonnum í 2-3 mánaðir.



*Rættiliga fitt av fólki var komið saman umborð á Arctic Janus týsdagin. Uttast til høgru takkar eigarin av skipinum, Betty Sennov, Ferðaráðið Føroya fyri samstarvi*



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



### Siri Eysturoy 50 ár

Í dag, 28. august, fyllir Siri Eysturoy í Havn 50 ár. Siri er fødd og uppvaksin í Havn. Foreldrini vóru Ingibjørg, f. Thomasen, ættað úr Kvívík, og Schønning Eysturoy úr Havn.

Siri er útbúgvin apoteksassistentur og arbeiddi á Tjaldurs Apoteki í umleið 15 ár. Hon er ein sjálvstøðugur og arbeiðssamur persónur. Í fleiri ár hevði hon útleiging av hátrýstsspularum um hendur. Fyri 19 árum síðan stovnaði hon sína egnu fyritøku, Siri, ið er ein serhandil innan heilsu og sjúkrarøkt. Handilin varð fyrstu tíðina í J.C. Svabosgøtu og flutti seinni í Dr. Jacobsensgøtu, har hann heldur til í dag.

Siri hevur verið virkin í Miðbýarfelagnum í Havn, og hevur hon saman við øðrum skipað fyri mótasýningum o.l. Eisini skipar hon fyri dansiskeiðum í Tangodansi.

Siri eigur fýra børn, tey eru: Freddy, Terji, Malan og Trina.

### Mortan á Argjum farin



Tað grunaði tú ikki, tá Marita og Mortan høvdu gullbrúdleyp 2. august – nú knappan mánað seinni, leygardagin 23. august, var teinurin hjá Mortani rógvin. Henda virkna mannavera er ikki meira okkara millum. Ein teirra tú altíð frøddist at samskifta við.

Henda dagin tók hann sær heldur ikki av løttum, hóast okkurt var til bága, tí nú hevði hann eisini mestsum bast hvørjum strá – tíma seinni var eisini Argjamaður var Mortan, føddur 26. juli í 1926, mamman Hanna hjá Linu av Argjum og pápin Jacob Pauli Joensen av Norðskála, Norðskála-Palli nevndur.

Mortan vaks upp í tíðarskeiði, tá Argir var bygd í orðsins sanna týdningi. Húsini vóru tá fá á Argjum, kúgv, høsn og annar fenaður í hvørjum húsi, pápin skipsfiskimaður. Tey sum heima vóru tóku sær av tí, sum gerast skuldi, umframt torvskurð, fáa torvið til sættis, grasið sláast, turkast og fáast til høldar – kúgvin kravdi sítt. Mortan vaks upp í hesi tíðini, og saman við mammuni tók hann sítt tørn, systkin hevði hann eingi.

Skúlagongdina fekk Mortan í Havn, á Argjum var eingin skúli tá, børnini fóru hvønn dag til Havnar í skúla.

Tá skúlin var av, fór Mortan at arbeiða burturav. Fyrsta arbeiði mundi vera hjá eingilskmonnunum, teir høvdu tá hersett Føroyar. Mortan var uppií, tá bretar bygdu sínar búðir, eisini tornið við heimsins enda, har uppi á hamrinum á Boðanesleiðini, var hann uppií at stoypa.

Leygardagin 2. august varð skrivað í blaðnum um gullbrúdleypið hjá Maritu og Mortani, og har varð sagt frá 77 ára langa lívsskeiði hansara.

Tað verður sagt um Mortan, at hann var eitt arbeiðsgrev og góður samstarvsfelagi, hann gavst ongantíð á hondum, hevði nógv jørn í eldinum – og honum líkt var hann eisini mitt í sínum arbeiði, tá ið hondin, ið øllum stýrir, beyð honum at gevast.

Vit drýpa høvur og lýsa frið yvir eina sermerkita og sterka menniskju, ið altíð var til reiðar at veita hjálpandi hondina – og vit sýna okkara samkendslu við Maritu, dreingjunum og øllum tykkara.

**jl**

### Dagbjartur Johansen farin



Týsnáttina andaðist Dagbjartur Johansen í Havn bert 56 ára gamal. Hann var føddur 25 august 1947, sonur Doru f. Gregersen, ættað úr Syðrugøtu og Elias Johansen, Elias hjá Olafi úr Havn.

Dagbjartur átti tríggjar brøður, Bjarna, Oddur og tvíburðabeiggjan, Olaf.

Í 1968 giftist hann Elmu Háberg og fingu tey børnini, Katrin, Dóru, Pætur og Elin.

Hugurin hjá Dagbjarti stóð til sjógvin, og í búnum aldri fór hann at lesa til skipsførara. Eftir eitt skifti at hava siglt við fiskiskipi, fór hann í starv hjá A.P Møller. Men sjúka steðgaði honum í hesum yrki, og hann mátti gevast at sigla.

Hóast sjúkan gjørdi, at Dagbjartur í bestu árum mátti gevast at arbeiða, so mistið hann ikki mótið kortini, men hevði ein ótroyttiligan lívsvilja.

Bert fáar tímar fyri, at hann mátti leggja frá sær og lúta fyri sjúkuni, skemtaði hann við tey, sum vóru komin at heilsa honum á føðingardegnum.

Dagbjartur hevði sett sítt álit á Harran, og hansara kæru kunnu gleðast um vónina, at ein dag síggjast tey aftur.

**rs**

### Sverri Jacobsen 70



Týsdagin 26. august fylti Sverri Jacobsen á Tvøroyri 70 ár. Hann varð føddur á Nesi í Vági, sonur Kristinu, f. Zachariassen úr Hesti, og Jóan Petur Jacobsen av Nesi.

Hann tók læraraprógv í Havn í 1956 og var í eitt ár lærari í Øravík og Øravíkarlíð. Síðani var hann lærari á Tvøroyri til 1995. Hann var á skeið á Danmarks Lærerhøjskole 1968-69 og 1976-77, serliga í støddfrøði og alis- og evnafrøði. Hann hevur havt ymisk kommunal álitisstørv á Tvøroyri.

Sverri giftist við Kristinu Magnussen úr Kvívík.

### Dagurin

**28. august. Augustinus,** deyður í 430. Føddur í Tagaste í Norðurafriku. Eftir mongum ymiskum vegum gjørdist hann kristin og endaði sum biskupur í Hippo eisini í Norðurafriku. Hann doyði, tá ið vandalakongurin Geiserik kringsetti staðin. Augustin var mætasti kirkjulærarin í fornkirkjuni og hevði tær komandi øldirnar mikla ávirkan á kristna heimspeki og guðfrøði. Augustin, Ambrosius,Gregorius og Hieronymus verða taldir sum kirkjufedrar í katólsku kirkjuni vestanfyri.

Aggusteinus er eitt føroyska navn.

Navnið Augustus er latínskt og merkir *hin hátt upphevjaði.*